# Vín heldur enn spiritus


*Vín skal á borðið – og vodkaið av borðinum – til jólaborðhaldini*

**Tað eru teir meira rafineraðu drykkirnir, sum fólk vilja hava til jólaborðhaldini og serliga til sjálvan jóladøgurðan**

JÒLABORÐ
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Bestu mánaðirnir hjá Rúsdrekkasølu landsins eru desember og juli. Allar stevnurnar og lýggja veðrið klára ikki at leggja sjógv millum seg og jólini – og ikki minst jólaborðhaldini. Rúni Olsen, innkeypsleiðari hjá Rúsdrekkasølu landsins, sigur, at tey merkja týðuliga, tá jólaborðhaldini byrjað, og kundarnir skulu finna fram til, hvat best sløkkir tostan til eitt tílíkt jólaborðhald.

- Tað er líkavið, at november og desember yvirhálað summarmánaðirnar, sigur Rúni Olsen.

### Vín heldur enn spiritus

Til jólaborðhaldini og jólini verður munandi meira vín drukkið enn um summarið. Teir vanligu spiritus drykkirnir detta afturum víni um jólini.

Føroyingum er serliga farið at dáma at drekka vín úr Kili og Avstralia. Franska vínið missir støðugt marknaðarpart.

- Fólk fáa meira vín fyri pengarnar í mun til franskt vín. Tú rindar fyri, at vínið er úr Fraklandi, sigur Rúni Olsen.

Øl verður eisini drukkið í ríkiligan mát á jólum og til jólaborðhaldini. Tað verður selt umleið helvt um helvt útlendskt og føroyskt øl. Og tað eru serliga tær serligu jólaølirnar, sum selja væl í desember og november.

- Flest øll merkini koma við jólaølum, og tað taka fólk til sín, sigur Rúni Olsen.

Fyrst í november verður jólaølið hátíðarhildið við serligum J-døgum.

### Kvanti- ella kvalitetur

Rúni Olsen sigur, at tað er ymiskt, hvussu nógv fólk ynskja at forkela seg sjálvan til jólafrokostin. Men tað er tó ein týðulig ábending, at tað er kvantiteturin meira enn kvaliteturin, farið verður eftir.

- Til sjálvan jóladøgurðan vilja fólk oftani forkela seg sjálvan. Tey keypa oftani gott vín, sum kostar eitt sindur, og so keypa tey eisini oftani whiskey, cognac ella líknandi, sigur Rúni Olsen.

Til jólafrokostin nýtist víni ikki at kosta so nógv hjá teimum flestu. Tað ræður oftani meira um kvantitet enn kvalitet. Men tað skal eisini merkjast, at tað er munur á jólunum og jólafrokostinum.




